# Brøðurnir droym

Teir hugsaðu als ikki um tindin, og tilvildin førdi teir í alme
í barnaárunum í Sørvági herdi teir, og orrusturnar hava ver
mangan arbeiðir ímóti í staðin fyri at stu

## Klæmint Weihe

**Vit kenna hann sum sterka og støðufasta SEV-stjóran, sum seinastu 23 árini hevur staðið við róðrið á risa fyritøkuni. Hann stendur við sítt og hevur tikið megnar tøk á føroyska orkuøkinum, og hetta hevur meiri enn einaferð fingið bæði fjølmiðlafólk og politikarar úr stólinum. Verkfrøðingurin úr Sørvági hevur eisini markerað seg í øðrum umstríddum nevndarsessum og er í dag javnan frammi sum nevndarformaður í Smyril Line.**



SAMRØÐA
*Heini í Skorini*
*heini_skorini@yahoo.com*

*Hvussu kunnu tit yvirornað lýsa tykkum sjálvar?*

**Pál:** Tað er torført at lýsa seg sjálvan, men mín sjálvsfatan er, at eg eri bráður, gerist sera lætt hugtikin, eri ótolin og gerist lætt ágrýtin, um okkurt fangar mín áhuga. Tá eg fái áhuga fyri onkrum, leypi eg avstað og havi als ikki stundir at bíða eftir hinum, og tá hini so umsíðir eru sannførd um mína søk og taka undir við mær, eri eg longu kólnaður og farin í holt við okkurt annað. Men hóast hesar eginleikar havi eg kortini eisini megnað at vera áhaldandi ella treiskur. Mínar vælsignaðu kyksilvurkanningar hava eftirhondini verið í gongd í 20 ár, so hóast mítt lyndi havi eg eisini varðveitt nakað av kontinuiteti.

Eg havi eisini tann keðiliga eginleika at gera alt í seinastu løtu, og lívið hevði mangan verið lættari, um eg dugdi betri at leggja mínar uppgávur til rættis. Klæmint kallar tað "kaos management".

Hóast tað kann tykjast mótsigandi, upplivi eg eisini, at eg eri grundleggjandi dovin. Mangan føli eg, at tað bert er rutinan, sum ger, at eg fari upp um morgunin í staðin fyri at vera liggjandi.

**Klæmint:** Eg eri arbeiðsnarkoman, sum familjan hevur goldið fyri, men eg dugi samstundis at kobla frá, leggja arbeiðið og álvarsemi til síðis og taka mær meiri av løttum. Eg elski at njóta friðin uttanfyri almenna ljósið, og sjálvur meti eg, at eg í ein mun eri smæðin, hóast kona mín helst sigur, at hesin pástandurin ikki er rættur. Í mínum arbeiði tori eg at standa við míni sjónarmið og vera støðufastur, og eg kann eisini vera bráður, hóast eg als ikki eri eins bráður sum Pál.

### Minnilutin í Sørvági

*Hvussu kunnu tit lýsa hvønn annan?*

**Pál:** Sum Klæmint sjálvur nevnir, so torir hann at hava og standa við sína sannføring, hóast hetta mangan er torført í einum lítlum landi. Ein kann hava álit á honum, og tað, hann sigur, meinar hann eisini. Hann torir at skera ígjøgnum og taka eina avgerð. Sum bróður er hann vinarligur, tað er altíð "behagiligt" at koma inn til hansara, og vit hava eitt álitisforhold, har eg altíð kann seta orð á mín iva og mínar trupulleikar.

**Klæmint:** Pál er gávuríkur og ótrúliga forvitin, sum hevur við sær, at hansara áhugi fevnir um nógv ymisk øki, sum røkka langt út um hansara fakliga øki. Hann lesur nógv og fylgir sera væl við, og hann hevur klárað seg væl bæði í Føroyum og úti í heimi. Hann er hjálpsamur, erligur og óttast ikki at siga tað, sum liggur honum á hjarta.

*Hvat/hvør hevur ávirkað tykkum mest?*

**Pál:** Mamma og pápi umboðaðu eina samanseting, sum hevur ávirkað positivt og altíð verið ein íblástur fyri meg. Pápi var sera tolerantur yvir fyri øðrvísi sjónarmiðum, og hann tordi at hugsa sjálvur. Mamma var ein praktiskur íverksetari, sum í barnaárum okkara í Sørvági einsamøll bygdi ein handil upp frá grundini, sum var eitt drúgt arbeiði. Viljin og arbeiðssemi hjá mammu og tolsemi hjá pápa hava altíð givið mær íblástur.

**Klæmint:** Frá pápa fingu vit tann meiri spekulativa og perspektiverandi partin, meðan vit í mammu sóu praktiska viljastyrki og ágrýtni, og hetta hevur havt avgerandi ávirkan á okkum báðar.

**Pál:** Ein annar ávirkandi partur av okkara barndómi var, at vit vuksu upp í brøðrasamkomuni í Sørvági og upplivdu tí at vera partur av einum minniluta í bygdini. Hesar uppvakstrarumstøður gjørdu, at vit vandu okkum við at vera uttanfyri, og hetta hevði við sær, at vit vóru noyddir at hugsa sjálvir, gerast sjálvstøðugir og finna okkara egnu sjónarmið. Tað, at vit vóru "uttan fyri tilhaldið" og ikki partur av meirilutanum, styrkti okkum og hevði við sær, at vit tíðliga toldu at vera øðrvísi og í andglettinum, sum ein var tá tí tíðini, um ein ikki var partur av fjøldini.

**Klæmint:** Í slíkum royndum og avbjóðingum eru møguleikarnir tvinnir: antin knekkar tú og gevur eftir, ella kemur tú styrktur frá tí, og tað seinna var galdandi fyri okkum. Tað hevur tíverri eisini víst seg seinni, at tilknýtið til hesa ávísa samkomu hevur verið nýtt í almennum atfinningum, serliga av ávísum fjølmiðlafólkum. Tað hoyrir ongastaðni heima.

### Ongar ambitiónir

*Tit hava báðir gjørt um tykkum, tykjast ambitiøsir og eru í dag almenn andlit og nøvn. Hvaðani kemur henda náttúran?*

**Pál:** Lat meg sláa fast, at um eg veruliga var ambitiøsur, hevði eg ongantíð komi heim aftur til Føroya. Valið at arbeiða sum lækni í Føroyum er júst at vinka farvæl til fleiri ambitiónir, sum bert lata seg gera í høgum sessum uttanlands.

Men tað er tó rætt, at eg havi markerað meg, fyrst og fremst á granskingarøkinum og í sessinum sum læknastjóri í 11 ár, men hetta er meiri ella minni av tilvild. Tað var soleiðis, at eg fekk eitt granskingarstipendiat frá Københavns Universitet fyrst í áttatiárunum og fór í holt við at granska, og líka síðani hevur hugurin at granska elt meg og broytt mína lívsleið.

Upprunaliga var ætlanin tó ein onnur. Tá eg kom aftur til Føroya, søkti eg tvey kommunulæknastørv, sum eg ikki fekk, og í staðin gjørdist eg fyrst serlækni og síðani yvirlækni á sjúkrahúsverkinum, áðrenn eg gjørdist læknastjóri í eini sera turbulentari tíð í kreppuárunum, tá nógvar truplar avgerðir skuldu takast.

So sæð í bakspeglinum hevði eg møguliga als ikki verið eitt alment navn, um eg hevði fingið ein av hasum kommunulæknasessunum, eg upprunaliga ynskti og fór eftir, tí so hevði lívsleiðin verið ein onnur.

**Klæmint:** Um eg skal vera heilt erligur, so droymdi eg ikki

### Fakta um Klæmint

Føddur í 1950
Radiomekanikari í 1971
El-verkfrøðingur í 1976
Verkfrøðingur á Datasabb frá 1977-78
Verkfrøðingur á Christian Rovsing frá 1979-80
Verkfrøðingur á SEV frá 1980-82
Virkandi stjóri á SEV í 1982
Stjóri á SEV frá 1983
Núverandi nevndarsessir: Nevndarlimur í Elnevndini, Føroya Dátusavni, Fjarhitafelagnum, SeaWave og Hotel Føroyum, og nevndarformaður á Smyril Line